# Smædnir føroyingar tordu ikki at spyrja

**Umboðini fyri útlendsku útbúgvingarstøðini hildu, at føroyingar settu alt ov fáar spurningar á Útbúgvingarstevnuni. Møguleiki var at fáa alla neyðuga vegleiðing um tær ymiskum útbúgvingarnar, men kortini tóku lestraráhugað ikki av góða tilboðnum á stevnuni um vikuskiftið.**

ÚTBÚGVINGARSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Oftað verður havt á lofti, at eitt høvuðseyðkenni við føroyinginum er, at hann vanliga er lítillátin og smæðin av lyndi. Hetta kunnu nú útlendsku umboðini á Útbúgvingarstevnuni um vikuskiftið skriva undir upp á. Smædna lyndið í føroyingum var eitt av eyðkennunum, sum útlendingarnir sótu eftir við, tá stevnan endaði leygardagin. Samskiparin av Útbúgvingarstevnuni, Holger Arnbjerg, sigur, at umboðini fyri útlendskum lestrarstøðini vóru á einum máli um, at føroyingarnir settu alt ov fáar spurningar.

– Teir hildu, at føroyingarnir vóru sum heild smædnir og afturhaldandi við at seta persónligar spurningar um lestrarstaðið. Flestu av útlendsku útbúgvingarstøðunum eru javnan á slíkum útbúgvingarstevnum, og tá verða tey bombarderað við spurningum, greiðir Holger Arnbjerg frá.

Føroysku gestirnir høvdu størsta áhuga í at hoyra, hvat tey ymisku lestrarstøðini høvdu at presentera, meðan fáir spurningar vórðu settir. Útlendsku gestirnir høvdu vónað, at fleiri spurningar vórðu settir, so tey vitjandi kundu veruliga gera sær dælt av teimum møguleikum, sum vóru á Útbúgvingarstevnuni.

Holger Arnbjerg sigur, at hetta er fyrsta útbúgvingarstevna í Føroyum, og føroyingar skulu eftir øllum at døma venja seg við slíkar stevnur. – Stevnan gav lestraráhugaðum føroyingum møguleika at fáa alla ta vitan, tey ynsktu, men kortini varð hesin møguleiki ikki útnyttaður til fulnar, sigur hann.

## Væl nøgdur

Útbúgvingarstevnan var bæði fríggjadagin og leygardagin, og í alt vóru 700-800 fólk í Norðurlandahúsinum hesar báðar dagarnar. Holger Arnbjerg sigur, at fyrireikarnir høvdu væntað eini 500-1000 fólk, og tey eru tí væl nøgd við undirtøkuna. Serliga fríggjadagin vóru nógv fólk at síggja, meðan leygardagurin var meir linligur.

– Fyrrapartin fríggjadagin vóru nógvir miðnámsskúlanæmingar at síggja. Av eini ella aðrari orsøk vóru ikki so nógv, sum eru liðug við sína miðnámsútbúgving á stevnuni, og tað er eitt sindur keðiligt, tí stevnan var eisini ætlað teimum. Tey vitjandi tóktust vera sera fegin um, at so nógvir ymiskir lestrarstovnar vóru savnaðir á einum staði, fortelur Holger Arnbjerg.

Fyrireikarnir hava ikki gjørt av, um Útbúgvingarstevnan verður endurtikin komandi ár. Í løtuni eftirmæla luttakararnir, útlendsku gestirnir og arbeiðsbólkurin stevnuna. Eftirmælini skulu nýtast til at fremja neyðugu broytingar, so Útbúgvingarstevnan verður enn betri næstu ferð.

## Eyguni upp

Holger heldur, at Útbúgvingarstevnan gevur ungum føroyingum góðar møguleika at ogna sær neyðugu vegleiðingina, áðrenn endaliga avgerðin um útbúgvingarvalið verður tikin. Hann heldur eisini, at føroyingar fáa á eini slíkari stevnu eyguni upp fyri øðrum útbúgvingarmøguleikum, enn teimum í Danmark og í Føroyum.

Á útbúgvingarstevnuni hesaferð vóru føroysk, donsk og útlendsk lestrarstøð javnt umboðað. – Serliga útlendsku lestrarstøðini høvdu góðan møguleika at gera vart við seg, tí kunnleikin um teirra lestrarstøð er avmarkaður í Frøoyum. Fleiri av útlendsku lestrarstøðunum høvdu lesandi føroyingar við sær, sum greiddu frá umstøðunum á staðnum, og eg haldi tað riggaði avbera væl, sigur Holger Arnbjerg.

## Sjúkrarøktarar best

Eftir Úbúgvingarstevnuna varð besti básur kosin. Av teimum í alt 40 básunum á stevnuni, var tað ein føroyskur básur, sum fór við heiðurinum. Sjúkrarøktarfrøðingarnir høvdu mest spennandi og orginala básin á Útbúgvingarstevnuni, og heiðursgávan var eitt litografi frá listamanninum Torbjørn Olsen.



*Samskiparin av Útbúgvingarstevnuni, Holger Arnbjerg, sigur seg vera væl nøgdan við undirtøkuna. Millum 700-800 fólk vóru á stevnu um vikuskiftið. Her sæst Holger Arnbjerg í básanum hjá sjúkarøktarfrøðingunum, sum varð kosin besti básur á stevnuni*



*Danska verjan var eisini við á útbúgvingarstevnuni. Á myndini síggjast f.v. Claus Rosendahl, flogvápni, Frede Damsø, fyri herin og Mads Jørgensen, sjóverjan*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Søguliga sambandið skal mennast

**Gjøgnum tíðina hava nógvir føroyingum nomið sær eina útbúgving í donsku sjóverjuni. Claus Rosendahl vónar, at henda siðvenjan heldur fram, og vónandi fara enn fleiri føroyingar at útbúgva seg í donsku verjuni**

ÚTBÚGVINGARSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Danska verjan hevði rættiliga brynjað seg til útbúgvingarstevnuna, sum var um vikuskiftið. Tríggir mans vóru komnir til Føroya at greiða frá lestrarmøguleikunum í donsku verjuni. Fyri mong kann ein útbúgving í verjuni tykjast sum eitt øðrvísi lestrarval, men søguliga hava nógvir føroyingar nomið sær eina útbúgving í verjuni.

– Sum siglingar tjóð burturav hava nógvir føroyingar lært hjá okkum. Tað er kanska serliga innan sjóverjuna, at nógvir føroyingar hava verið. Eg vóni sjálvsagt, at føroyingar halda á við at taka eina útbúgving innan sjóverjuna, men vit vilja eisini gjarna hava føroyingar at royna aðrar útbúgvingar hjá okkum. Ein útbúgving í verjuni gevur góðan møguleika at fáa starv í Føroyum, tí vit hava jú eina deild heruppi, sigur Claus Rosendahl fyri donsku verjuna.

## Leiðarastarv

Teir tríggir menninir á básanum hjá verjuni greiddu teimum vitjandi frá um útbúgvingarnar í herinum, flogvápninum og sjóverjuni. Teir eggjaðu serliga føroyingunum til at hyggja nærri at officer útbúgvingini, sum er væl dámd í Danmark. "Forsvarets Officeruddannelse" tryggjar teimum lesandi eitt leiðarastarv, tá lesturin er lokin.

## Sama mannagongd

Spurdur, um danska verjan hevur nýtt nógva tíð til at fyrireika seg til útbúgvingarstevnuna í Føroyum, svarar Claus Rosenblad, at útbúgvingarstevna í Føroyum minnir nógv um stevnurnar í Danmark, og tískil varð einki eykað gjørt burturúr.

– Vit hava ein standard bás til slíkar stevnur, og hann brúka vit eisini her, so hetta er tað vanliga hjá okkum. Eg má kortini leggja afturat, at stevnan gevur okkum eitt gott høvi til at vísa, at vit eru til. Vit fáa eisini greitt føroyingum frá, at ein útbúgving í verjuni er ein góður møguleiki, og vónandi taka fleiri føroyingar av okkara tilboðum, sigur hann.

# Føroyska ferðavinnan er ein gimsteinur

**Karim Sidaoui frá hotell skúlanum í sveisiska býnum, Lausanne, heldur, at føroyska ferðavinnan eigur gera sær dælt av vøkru náttúruni í Føroyum. Stendur tað til hansara, so skulu føroyingar fáa neyðuga kunnleikan um ferða- og hotellvinnu á skúlanum í Lausanne**

ÚTBÚGVINGARSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

– Tit hava ótrúliga stórar møguleikar í ferðavinnuni. Vakra náttúran í Føroyum er ein gimsteinur, og hon eigur at lokka nógv fleiri útlendingar til Føroya, sigur Karim Sidaoui frá Hotel skúlanum í Lausanne.

Stendur tað til hansara, so verður tað hotell skúlin í sveisiska býnum Lausanne, sum leggja ungum føroyingum lag á. Karim er komin á útbúgvingarstevnu í Føroyum við teirra vón at sannføra lestraráhugaðar føroyingar um at fáa sær eina útbúgving innan ferðavinnu og hotellvinnu. Sum agn hevur Karim Sidaoui faldarar og CD-rom at geva teimum vitjandi. Seinnapartin fríggjadagin hava nøkur verið vitja hansara bás í Klingruni í Norðurlandahúsinum, og Karim letur væl at.



*Fólk í Føroyum vita ikki so nógv um okkara skúla, og tí er henda stevnan eitt frálíkt høvi at gera vart við okkum, sigur Karim Sidaoui*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

– Fólk í Føroyum vita ikki so nógv um okkara skúla, og tí er henda stevnan eitt frálíkt høvi at gera vart við okkum. Nøkur hava longu víst áhugað, so tað er positivt. Eg havi eisini fingið samband við fólk í hotell vinnuni í Tórshavn, sum vit kunnu arbeiða víðari við, sigur hann

## Góðkendur

Hotell skúlin í Lausanne er frá 1893. 110 ára gamli skúlin er einasti hotel skúli í Sveis, sum er góðkendur sum universitetsskúli. Næmingarnir koma úr 71 ymiskum tjóðum, og undirvísingin fer fram bæði á enskum og fronskum. Møguleiki er fyri at taka eina hálvtannað árs útbúgving, eitt BA stig ella ein Master innan hotel- og ferðavinnu í Lausanne.

– Vit útbúgva fólk, sum arbeiða innan ferðavinnuna, hotell vinnuna, kasino, náttklubbar og flogvinnuna, sigur Karim Sidaoui.

# Hyggið longur enn til Danmarkar

**Stuart Rennie frá Robert Gordon University biður føroyingar velja onnur útbúgvingarstøð, enn tey í Danmark. Hann heldur, at tað er týdningarmikið, at arbeiðsmegin í einum landi er so fjølbroytt sum møguligt.**

ÚTBÚGVINGARSTEVNA
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Av teimum í alt 44 básunum á Útbúgvingarstevnuni, var ein stórur partur av básunum settur av til universitet úr ymiskum londum. Skotski býurin, Aberdeen, var umboðaður av tveimum universitetum á stevnuni.

Seinnu árini hava fleiri og fleiri føroyingar valt Skotland sum sítt lestrarstað. Serliga hava útbúgvingar innan oljuvinnu og búskaparfrøðið í Skotlandi havt stóran áhuga.

– Eg haldi tað er týdningarmikið, at føroyingar hyggja eitt sindur longri enn bara til Danmarkar, tí tað eru also nógvir aðrir møguleikar. Tað er týdningarmikið fyri arbeiðsmegina í einum landi, at hon er fjølbroytt. Á Robert Gordon Universitetinum halda vit, at vit hava nógv spennandi at bjóða lestraráhugaðum føroyingum. Eg kann millum annað nevna verkfrøði, design, teldufrøði og búskaparfrøði, fortelur Stuart Rennie, sum starvast á Robert Gordon University í Aberdeen.

Robert Gordon samstarvaði fyri nøkrum árum síðan við Fróðskaparsetur Føroya, og í dag hava teir eina samstarvsavtalu við Føroya Handilsskúla. Samstarvið við føroyingar eru skotarnir fegnir um, men teir vilja gjarna menna og økja samskiftið við Føroyar.

## Góð hagtøl

Robert Gordon universitetið og vinnulívið í Aberdeen arbeiða tætt saman. Tey lesandi eru vanliga eitt ár av lestrartíðini úti í vinnulívinum og arbeiða. r. Samstarvið millum vinnulív og universiteti gevur eisini góð úrslit, tí sambært hagtølunum fáa í alt 86% av teimum lesandi á Robert Gordon starv, tá tey eru liðug við útbúgvingina.

Universitetið er rættiliga stolt av hesum hagtølum. Sammett við onnur universitet í Stóra Bretlandi, er tað bert eitt universitet, sum kann breggja sær av betri hagtølum enn Robert Gordon á hesum økinum.

– Okkara tætta samband við vinnulívið, gevur góð úrslit. Vit halda, at tey lesandi fáa eina góða barlast hjá okkum, og vit fyrireika tey væl til stóru avbjóðingar, sum eru úti veruliga lívinum, eftir lestrartíðin er av sigur Stuart Rennie.



*Stuart Rennie biður føroyingar royna onnur útbúgvingarstøð, enn tey í Danmark. Á myndini sæst hann við Jenny McConnachie, sum bæði starvast á Robert Gordon University í Aberdeen.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*